ÍF-TB:

# TB spælir fyri lívinum

**Hóast fuglfirðingar hava skemtað við gøtumenn um alt annað, so siga teir seg ætla at gera alt fyri at varðveita sætta plássið**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í gjárkvøldið fóru tvøráamenn enn eina ferð norður um fjørðin í fótbóltsørindum. Ferðirnar hava verið nógvar í ár, og í TB gleða teir seg til at fáa frí frá fótbóltsferðingini. Men teir høvdu einki havt ímóti, at talan kanska gjørdist um eina ferð afturat norðureftir.

- Hjá okkum er einki sum eitur. Tað er alneyðugt hjá okkum at fáa stig í Fuglafirði. Um tað eydnast at vinna, kunnu vit enda á 8. plássinum. Tað er ynskistøðan. Men okkara endastøða er eisini treytað av, hvussu tað fer at hilnast hjá GÍ og VB. Málið er í fyrstu atløgu at sleppa av aftasta plássinum. Um vit fáa stig í Fuglafirði, og úrslitini aðra staðni laga seg soleiðis, at vit skulu spæla um plássið í deildini, so fara vit at taka tað sum gott úrslit, sigur 37 ára gamli TB veteranurin Jón Johannesen.

*Umhugsar tú at gevast?*

- Tað hevur verið sera áhugavert at vant og spælt í ár, og í løtuni er tað ikki at gevast, sum liggur fremst í huganum. Eg haldi, at okkara avrik hava verið væl betri enn til niðurflyting. Eina ferð man fara at gleppa. Vónandi verður tað nú. Vit sóu, hvussu tað eitt nú var hjá Skála. Teir stríddust í fleiri ár fyri at sleppa undan niðurflytingini, og nú er teir við í FM stríðnum.

Jón Johannesen sær møguleikan at vera góðan fyri, at teir í kvøld kunnu fara suður aftur á øðrum enn aftasta plássinum.

- Um vit skulu meta út frá úrslitunum higartil, so eigur tað at vera ógvuliga lítið sannlíkt, at Skála missir stig á heimavølli móti GÍ. Hvussu tað kann fara at laga seg í Vági, har EB/Streymur fer at vitja, er kanska meiri opin spurningur. Men framvegis er tað soleiðis, at tað fyrst og fremst er upp til okkum at fáa stig. Um tað ikki eydnast, so fer tað einki at nytta, hvussu tað fer at ganga aðra staðni.

Alexandar Jovevic er leikbannaðu, og tað er ivasamt, um Jón Tórður Holm verður førur fyri at spæla.

Fuglfirðingar og gøtumenn hava støðugt spæl gangandi, har tað ikki er frítt, at teir í fótbóltshøpi arga hvønn annan. Í mong ár hava gøtumenn verið omaná, og tað vóru teir eisini á Ólavsøku, tá ið teir vunnu Løgmanssteypið móti ÍF. Nú eru tað fuglfirðingar, sum hava fatur á langa endanum, og tað kann væl fara at vísa seg, at úrslitið í Fuglafirði fer at verða avgerandi fyri, um tað verður TB ella kanska GÍ, sum fer at flyta beinleiðis niður.

- Kanska hava fuglfirðingar eisini hesa seinastu vikuna argað teir eitt sindur. Men eingin ivi skal vera um, at vit ætla okkum at dríva á í dag. Málið er at varðveita sætta plássið. Um tað lagar seg illa, so er møguleiki fyri, at vit fara at detta niður á áttanda plássið. Tað ætla vit okkum ikki.

Tað sigur ÍF miðvallarin Høgni Zachariasen. Hann er tann einasti á ÍF liðnum, sum hevur verið á liðnum í øllum landskappingardystunum í ár.

- Vit hava so at siga vant út í eitt síðani fyrst í januar. Málið var at stabiliserað okkum mitt í deildini. Sætta plássið er ikki heilt nóg gott. Vit løgdu væl fyri, men so vóru tað ov nógv umfør, tá ið vit fingu ov lítið burturúr. Nú fram móti endanum hevur tað aftur hilnast hampuliga væl.

Í Fuglafirði eru allir teir tøkir, sum spældu í Runavík síðsta sunnudag. Spurningurin er eitt nú, um Bartal Eliasen, sum í Runavík var á beinkinum í 1. hálvleiki, hesa ferð verður millum teir fyrstu ellivu.



*Tvøramenn hava enn einaferð knívin á barkanum. Og hesa ferð ER talan um seinasta útkall*

# B68 eigur avgerðina

**B71 roknar ikki við møguleikanum at flyta beinleiðis upp, og í Eysturoyh er møguleiki fyri, at drúgvastu feløgini í Eysturoy í dag fara at skifta um pláss**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Síðsta umfarið í 2. deild er á skránni í dag klokkan 13.00. Tó er dysturin í Hvalba, har B71 fer at vitja, útsettur ein hálvan tíma. Fyrsta brísklið har verið klokkan 13.30.

Tá ið Royn vitjaði á Sandi, vann heimaliðið 10-1. Men sandoyingar taka uppgávuna í dag í stórum álvara. Teir siga seg ikki rokna við, at B68 fer at snáva móti GÍ, sum longu er niðurflutt, og sum er manningarliga so illa spert, at onkrir dreingjaliðsspælarar fara at hjálpa til á Svangaskarði í dag.

Sambært B71 heimasíðuni - b71.com - so ætla sandoyingar at nýta løtuna á grasinum í Hvalba sum fyrireiking til endaspælið um pláss í bestu deildini. Teir báðir dystirnir verða á skránni 26. og 29. oktober ella nú mikudagin og leygardagin um eina viku.

Í B68 síggja teir seg sjálvar sum vandamiklastu hóttanina undan síðsta heimadystinum, sum verður móti GÍ. Tað ræður um at finna hugburðin fram aftur, sum varð vístur í Sandavági fyri viku síðani, siga toftamenn, og so verður undirstrikað, at dysturin móti GÍ ikki er vunnin frammanundan.

- Tá ið vit vóru í Gøtu, var GÍ botnlið, og vit vóru oddalið. Vit vunnu 4-2, men teir vóru frammanfyri 1-0 og 2-1, og tað var ikki fyrrenn síðsta korterið, at tað glapp hjá okkum, verður sagt av Toftum.

AB, sum Jóannes Jakobsen fyri síðstu ferð hevur ábyrgdina av, eigur heimadyst móti Sumba. Argjamenn kappast við FSVágar04 um bronsumerkini. FSV04 skal spæla í Gundadali móti B36, sum er næstniðast og harvið á plássinum, sum ber endaspæl móti KÍ, ið var næstbest í 3. deild, um pláss í deildini við sær.

Í Leirvík fara teir næstbestu í HB at spæla. Báðir partar hava tryggjað sær rættin at halda fram í deildini.

Og so er tað spurningurin um, hvør fer at verða toppskjútti. Súni Fríði Barbá í AB gjørdi fyri viku síðani stórt hál. Hann hevur nú skorað 26 ferðir ella eitt mál meiri enn Clayton Soares hjá B71, sum leingi hevur verið ovast á málskjúttaralistanum í 2. deild.



**Jón Johannesen, TB:**

1. Skála
2. B36
3. HB

8. VB
9. TB
10. GÍ



**Heðin á Lakjuni, KÍ:**

1. Skála
2. B36
3. HB

8. VB
9. TB
10. GÍ



**Pól Thorsteinsson, B36:**

1. B36
2. Skála
3. HB

8. VB
9. TB
10. GÍ



**Sámal Joensen, GÍ:**

1. HB
2. B36
3. Skála

8. VB
9. GÍ
10. TB



**Pauli G. Hansen, Skála:**

1. Skála
2. B36
3. HB

8. VB
9. GÍ
10. TB